## Skírishósdagur 12. apríl

### SVF

14.00 Dreymurin um eina mammu – norsk sending
14.30 Bíblian: Salomon 1:2 – evropeisk stuttrøð Óhóskandi fyri smábørn
16.00 Gudstænasta í Sandavágs kirkju
17.10 Á sanganna veingjum – Olge Marie, norsk sangarinna
18.10 Oggy og kakkulakkarnir – teknifilmur
18.30 Pinkupól 6
18.35 Jumanji 11
19.05 Rovdyr í grannalagnum – no. sending
19.20 Salka Valka kring knøttin 1:6 (e)
19.50 Andakt við Una Næs
20.00 Ferðin – eitt tónleikaverk eftir Sunleif Rasmussen
20.35 David Copperfield 1:2 – am. stuttrøð
22.05 Krimitímin: Dalziel og Pascoe 2:2 – ensk røð
22.55 Sex, stílur og stjørnustatus – kan. dokumentar
23.45 Liðugt

### Eurosport

07.30 Cycling
08.30 Cycling
09.30 Darts
10.30 Ice Speedway
11.30 Car Racing
12.00 Olympic Games
12.30 Boxing
14.30 All Sports
14.45 Cycling - Live
16.30 Xtreme Sports
17.00 Xtreme Sports
17.30 News
17.45 Roller Skating
19.00 Cycling
20.00 Boxing
22.00 News
22.15 Football
23.15 Cycling
00.15 News
00.30 Close

### BBC Prime

00.00 TLZ: »The Promised Land – Sweet Home Chicago«
01.00 TLZ: »White Heat – The Beat of the System«
02.00 TLZ: »What have the 70's ever done for us?«
02.10 TLZ: »Background Brief«
02.30 TLZ: »The Incredible Shrinking Chip«
03.00 TLZ: »The Next Big Thing – Eyes in the Sky«
03.30 TLZ: »Missing the Meaning?«
04.00 TLZ: »French Fix – Family Celebrations«
04.30 TLZ: »Landmarks – The Caribbean Islands - Climate«
04.50 TLZ: »Trouble Shooter – Back in Business – What Now Guru?«
05.30 TLZ: »Kids English Zone – 2 My Body«
06.00 The Animal Magic Show
06.15 Playdays: »The Tent Stop«
06.35 Insides Out
07.00 The Really Wild Show
07.30 Ready, Steady, Cook
08.15 Style Challenge: »Avant Garde«
08.40 Change That
09.05 Going for a Song
09.30 Vets to the Rescue
10.00 Antiques Roadshow
10.30 TLZ: »Horizon – Bones of Contention«
11.50 Ready, Steady, Cook
12.35 Style Challenge: »Afro Hair«
13.00 Doctors: »Poles Apart«
13.30 EastEnders
14.00 Change That
14.25 Going for a Song
15.00 The Animal Magic Show
15.15 Playdays: »The Tent Stop«
15.35 Insides Out
16.00 The Really Wild Show
16.30 Top of the Pops Eurochart
17.00 Home Front
17.30 Doctors: »Killing me Softly«
18.00 EastEnders
18.30 Animal Hospital
19.00 You Rang, M'Lord?: »Gretna Green or Bust«
20.00 Casualty: »Better Safe than Sorry«
21.00 Absolutely Fabulous: »Sex«
21.30 Top of the Pops Eurochart
22.00 Maternity
22.50 Maternity
23.40 Dr Who: »Snakedance«

### BBC World

00.00 BBC News
00.30 HARDtalk (r)
01.00 BBC News
01.30 Holiday (r)
02.00 BBC News
02.30 Reporters (r)
03.00 BBC News
03.30 Asia Today (r)
03.45 World Business Report (r)
04.00 BBC News
04.30 HARDtalk (r)
05.00 BBC News
05.30 Top Gear (r)
06.00 BBC News
06.30 Reporters (r)
07.00 BBC News
07.30 HARDtalk
08.00 BBC News
08.30 Talking Movies (r)
09.00 BBC News
09.30 The Money Programme (r)
10.00 BBC News
10.30 HARDtalk (r)
11.00 BBC News
11.30 Holiday (r)
12.00 BBC News
12.30 The Money Programme (r)
13.00 BBC News
13.30 HARDtalk (r)
14.00 BBC News
14.15 World Business Report
14.30 Top Gear (r)
15.00 BBC News
15.30 The Money Programme (r)
16.00 BBC News
16.30 Asia Today
17.00 BBC News
17.15 World Business Report
17.30 Talking Movies (r)
18.00 BBC News
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News
20.30 Click Online
21.00 BBC News
21.30 World Business Report
22.00 BBC News
22.30 Life
23.00 BBC News
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

### 3 Viasat

05.00 Børne-hjørnet med Disney
07.05 TV-shop
08.35 Garfield og venner
09.00 Sunset Beach
09.50 Træneren
10.20 Horton-sagaen
11.10 Horton-sagaen
12.00 Melrose Place - classic
12.55 Vild med dig
13.25 Panter-tanter
13.55 Xena - amazonekrigeren
14.50 Baywatch
15.45 Min kære familie
16.10 Ricki Lake
17.30 Baren
18.00 Alle tiders barnepige
18.30 Baren
19.00 Onside: Faxe Kondi Ligaen
20.00 Skjulte Spor
21.00 TV Razzia
21.30 Heksene fra Warren Manor
22.25 Baren (70
22.55 Vore værste år
23.25 Simpsons
23.55 Ti tommelfingre
00.25 Kojak
01.25 I lyst og nød
01.50 Drøm videre
02.20 Ellen
02.45 Ricki Lake
03.45 Godnat

### Útvarp Føroya

10.00 Tíðindini
10.05 Barnaútvarpið Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri
10.30 Dymbildagavikan (e) Bibliskar vísur. Axel Tórgarð leggur til rættis. Martin Restorff Jacobsen og Ívar Iversen lesa.
11.00 Útvarpsguðstænasta Høgni Poulsen, prestur, prædikar
11.45 Úr konserthøllini
12.30 Døgurðatónar
13.10 Bretskur konsul í Føroyum Jógvan Arge lesur 4. part av bók eftir Henry Montagu Villiers. Hans Jacob Debes týddi.
13.40 Við keldu til náðar á Tónleikur og sangur til Skírisdag. Janus Mohr leggur til rættis.
14.00 Tíðindi
14.15 Ein deutches Requiem av Johannes Brahms Føroya Symfoniorkestur og norskt kamarkór framføra. Fyrri partur.
15.00 Hjálp til sjálvhjálp í Russlandi Ferðafrásøgn hjá Helga Jacobsen
16.00 Brockes Passión av Gottfried Heinrich Stölzel Fyrra sending. Martin Restorff Jacobsen leggur til rættis.
17.00 Konsertferð fyri barnaheim í Vestmanna Sending um konsertferð hjá Ellen Dahl, Alfred Dahl og Hassa Bærentsen kring Føroyar í 1945 til frama fyri barnaheimið í Vestmanna. Hans Egholm leggur til rættis.
17.45 Í víngarðinum
18.30 Tíðindini

## Salka Valka kring knøttin 1:6 (e)

**SVF Hóskvøldið kl. 19.20**

Á páskum fara vit at endursenda tær seks sendingarnar, sum Durita Holm og Erik Torjusen gjørdu - kring knøttin við bátinum Sølku Vølku.

Í hesi fyrstu sendingini eru vit umborð á Sølku Vølku, sum á leiðini úr Kosta Rika, legði inn á Galapagos, áðrenn ferðin helt fram til oyggjarnar í Fronskum Polynesia. Vit uppliva tað tiltikna djóralívið á Galapagos oyggjunum, og vit eru eisini við til ymiskar gerandishendingar umborð og til ein føðingardag á opnum havi.

*Lagt til rættis: Durita Holm og Erik Torjusen*
*Klipt: Bjarnheðin í Hoyvík*

## Hjálp til sjálvhjálp í Russlandi

**ÚF Hóskvøldið kl. 15.00**

Í mars var Helgi Jacobsen boðin til Russlands saman við 10 øðrum tíðindafólkum úr Norðurlondum. Norðurlandaráðið stuðlar bæði peningaliga og á annan hátt verkætlanum í Vesturrusslandi og í teimum Baltisku londunum og endamálið við ferðini var at hyggja at nøkrum av hesum verkætlanum.

Ein av mest umfatandi uppgávunum er at reinsa kemiska frárenslið í St.Pætursborg, sum dálkar finsku víkina og Eystrasalt. Nógv orka verður eisini løgd í at basa tuberklum og øðrum smittandi sjúkum.

Ferðalagið vitjar í St.Pætursborg og Arkangelsk har norðuri í Vesturrusslandi.

## Skjulte Spor (14)

*– Donsk dramarøð*



**3 Hóskvøldið kl. 20.00**

Micheal er til fótbóltsvenjing við soni sínum og møtir har landsliðsstjørnuni Martin Schönbæk, sum nú situr í koyristóli eftir eina álvarsama ítróttarvanlukku. Schönbæk hevur fingið hóttanir eftir lívinum og hann er bangin fyri lívi sínum. Dagin eftir verður hann funnin deyður í heiminum. Seinasta lívstekinið var eitt neyðarróp eftir Micheal, sum nú má taka málið í egnar hendur.
Samstundis fær støðin vitjan av einum illgrunaverdum persóni – einum bankaránara, sum ikki hevur sagt eitt orð í 48 tímar. Uppgávan er einføld. Fá hann at tosa og finn tær 9 milliónirnar, sum eru horvnar úr bankanum. Tann uppgávan vísir seg tó at vera torførari enn væntað.

### Rás 2 FM 102 FM 107

10:45 Orðið Bíbliulestur v/ Anju Hansen
11:00 Gospeltónleikur
13:00 Halguprát Heine Lútzen leggur til rættis
14:00 Føroyskt gospel
15:00 Góðu gomlu: Jim Reeves Laila Jacobsen leggur til rættis
16:00 Elvis Sonne Smith leggur til rættis
17:00 Tónleikur
19:00 Orð á leiðini EvR sending "Hví mátti Jesus doyggja?" Jógvan Zachariassen leggur til rættis
20:00 Á Torginum (e) EvR sending Samrøða við Høgna Johannesen um m.a. missión í Asia og Pakistan
21:15 Orðið (e) Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Tónleikur

### Lindin

09.00 Byrjan
09.05 Tónleikur
09.30 »Við Honum út á Golgata« Upplestur úr bókini hjá Frederik Wisløff. Úr Jesusar líðingarsøgu
10.00 Okkara dagliga breyð
11.00 »Av mold ert tú komin« við Dánjal á Dul Jacobsen
13.00 Byrjan - Dagsskrá
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Tónleikur
17.00 Ungdómssendingin Get Ready v/ Rigmor og Rebekku
18.00 Dagsins Orð
18.05 The Finishing Touch - Ensk sending við tónleiki og práti. Vertur er Alex O'Campo
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending
19.15 The Finishing Touch heldur fram
20.00 »Við Honum út á Golgata« Upplestur úr bókini hjá Frederik Wisløff. Úr Jesusar líðingarsøgu
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Lýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum
20.55 Dagsins Orð
21.00 Bønarlinjan við gesti - Bønarevni kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379 - Vertur tykkara hesarferð: Jenis av Rana.

Vit gevast uml. middnátt



# ítróttur

Nr. 68 • fríggjadagur • 6. apríl 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Talvið hesa vikuna

**Hetta talv bleiv telvað í FM í fjør á Oyrarbakka, 2. umfar. Eitt rættiliga áhugavert talv, umframt sera avgerandi eisini**

**IM John Rødgaard — Heini Olsen**
FM 2000 - Meistarabólkur Oyrabakki (2), 16.04.2000

1.c4 Nf6 2.Nf3 e6 3.g3 d5 4.d4 dxc4 5.Qa4+ Nbd7 6.Bg2 a6 7.Qxc4 b5 8.Qc6 Rb8 9.Bf4 Nd5 10.Bg5 Be7 11.Bxe7 Qxe7 12.Nc3 Nb4



13.Qxc7! Nc2+ 14.Kd1 Nxa1 15.Ne5 0-0 16.Nc6 Qe8 17.Nxb8 b4 18.Kd2 bxc3+ 19.bxc3 Nxb8 20.Qxb8 e5 21.Rxa1 exd4 22.cxd4 Qa4 23.Qb2 Rd8 24.e3 Be6 25.Be4 Qa5+ 26.Qc3 Qh5 27.h4 Rc8 28.Qb4 Bf5 29.Qb7 Qg4 30.Rc1 Re8 31.Bf3 Qg6 32.Qc6 f6 33.h5 Qg5 1-0

# FM byrjar leygardagin



*Verandi føroyameistarin, Flóvin Þór Næs tekur ikki lut í ár, men talan er tó um ein sera sterkan landsliðsbólk*

**Vestmenningar hava samlað sterkasta landsliðsbólk nakrantíð, og eisini er líkt til at luttakaratalið verður høgt.**

TALV:
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Leygardagin verður farið undir at dystast um FM í talvi, sum í ár fer fram í Vestmanna.

### John Arni, John og Heini

Millum teir fyrstu sum teknaðu seg vórðu føroyameistarin frá 1998 IM John Rødgaard og fimmfaldaði føroyameistarin Heini Olsen (1989, 1991, 1992, 1993 og 1999). Tað seinasta nýggja er at føroya fremsti telvari John Arni Nilssen, sum enn ikki hevur ognað sær FM-heitið, hevur teknað seg. Toppurin er tí umboðaður í Vestmanna, og er hetta sera gleðiligt.

Føroyameistarin í fjør Flóvin Tór Næs luttekur ikki og er hann saman Boga Ziska og Rógva W. Rasmussen teir einastu í topp 10 sum við vissu ikki luttaka. Ivamál er um Torbjørn Thomsen luttekur. Talan er tí um sera sterkan bólk, tann sterkasti føroyskari talvsøgu.

Teir sum við vissu koma at telva í landsliðsbólkinum umframt topp trý, eru Ólavur Simonsen, Eyðun Nolsøe, Rani Nolsøe, Jens Kristian Hansen, sum telvar aftur fyri fyrstu ferð í FM-einstaklingakappingini síðani 1992, Martin Poulsen sum vann almenna bólkin í fjør og hevur tí tryggja sær pláss í fremsta bólki, og Carl Eli Nolsøe Samuelsen sum eftir eina góða kapping í Danmark helst hevur tryggjað sær luttøku. Nýggi ratinglistin er ikki kunngjørdur, men vissa er tó um hesar níggju telvarnar. Ivamál er um Jóan Hendrik Andreasen sleppur ígjøgnum nálareygað ella skal leiðina niður í almenna bólkin, eftirsum Torbjørn Thomsen enn ikki hevur avgjørt sína luttøku.

Sum sagt er kappingin sera sterk, har John Arni er sjálvskrivaður favorittur við Heina og John sum varafavorittar. Síðani er eitt lop niður tá rating viðvíkur til Ólav, Eyðun og Rana, men eru hesir allir við fyri at vinna, og er tí spurningurin opin um FM-heitið.

Áhugavert er um Jens Kristian kann finna gamla stórformin fram aftur, og kann hann tað skal hann als ikki avskrivast. Um Martin og Carl Eli kunnu gera seg galdandi millum leyvirnar er ringt at siga, men fara tó teir uttan iva at gera eina roynd til tess.

Virðislønirnar er methøgar í landsliðsbólkinum við einari 1. virðisløn á heili 7.000 krónur. 2. og 3. virðisløn eru ávíkavist 4.000 kr. og 2.000 kr.

### Almenni bólkurin sterkur

At landsliðsbólkurin er sterkur ger sjálvsagt eisini almenna bólkin sterkan. Her verða nøvn sum Terji Petersen, Herluf Hansen, Hanus Brekká, Finnbjørn Vang og veteranurin Helgi Joensen at síggja í Vestmanna. Ungi Olaf Berg hevur ikki teknað seg enn, men væntandi og vónandi luttekur hann. Hann hevur eftir HT-Open, sum hevur verið telvað í vár, gjørt eitt skarvslop á ratinglistanum og endar umleið á eini 2000 í rating.

Aðrir sum royna sína eydnu í ár verða teir royndu Gutti Petersen og Vagn Heldarskarð.

Virðislønirnar í almenna bólkinum eru ávíkavist á 1.500 kr., 1.000 kr. og 500 kr.

Eins og í fjør verður ein veteranbólkur. Hesir fara at telva seks talv yvir tríggir dagar. Tað vil siga tvey talv um dagin har teir hava ein tíma hvør til talvið. Tað eydnaðist væl í fjør, og superveteranurin Jústines Hansen sum vann í fjør, fer saman við føroyameistaranum frá 1972 Hans Petersen, Dánjal Petur Højgaard, Niels O. Durhuus, beiggjunum Joen Pauli Johannesen og Jørgin Johannesen, og Magna Thomassen at stríðast um fyrsta pláss. Kappingin hjá teimum er meira at kalla ein hugnakapping, har teir minnast gamlar dagar, men uttan iva fer hvør einstakur eftir steypinum, kenna vit teir rætt. Vælhugsandi er at fleiri veteranar tekna seg.

### Nógv nýggj nøvn

Unglingabólkurin tykist ikki at verða eins sterkur sum hann plagar, men gleðiligt er at síggja at so nógv nýggj nøvn eru á luttakaralistanum. Barnatelvingin í feløgum kring landið er høvuðssorsøkin til hesa gleðiligu unglingatilgongd.

Klári favoritturin er Hans Kristian Simonsen sum sera yvirraskandi hevur valt at telva í unglingabólkinum. Hann hevði styrkisliga ligið í ovari helvt í almenna bólkinum, men hevur allarhelst eitt ynski at verða unglingaføroyameistari.

FM verður telvað í døgunum 7-14. apríl í Vestmanna skúla. Møguligt er at kontakta fyrireikarnir á telduposti: jm@sev.fo